

## Granskarar
### - Alivísind og marin biotøkni

P/F Fiskaaling søkir tveir granskarar til at styrkja um granskingarvirksemi stovnsins.

P/F Fiskaaling er ogn hjá Føroya Landsstýri. Høvuðsskrivstovan er við Áir, har felagið fremur kynbótaarbeiði og gransking. Felagið hevur eisini eina lívfiskastøð í Skopun, eina marina royndarstøð í Nesvík, eina sílastøð í Skálabotni, og eina alistøð í Hesti. Fiskaaling hevur drúgvar royndir við kynbótaarbeiði av laksi og sílum, og við kalvaaling. Harafturat hevur Fiskaaling nýliga íverksett eina spennandi royndarverkætlan fyri toskaaling.

Til at menna verandi og framtíðar alivinnu og marina biotøkni, er Fiskaaling við at uppbyggja eitt granskingarumhvørvi í alivísind, gen- og biotøkni í samstarvi við granskingarstovnar bæði innan- og uttanlands.

STARVSINNIHALD OG GRANSKINGARØKI
Granskararnir koma at fyrireika og leiða nýggjar granskingarverkætlanir, umframt at kveikja og vegleiða aðrar granskarar á stovninum. Úrslitini frá granskingini verða almannakunngjørd í altjóða vísindaligum tíðarritum, og kunnaði vinnuni.

Vit søkja fólk við áhuga í:
- Aling av nýggjum fiskasløgum, nýggj alitøkni og kunningartøkni
- Gen- og biotøkni

KRAVDIR FØRLEIKAR
- Universitetsútbúgving í náttúruvísindi/verkfrøði, góðar fakligar og persónligar førleikar
- Góðan málkunnleika í enskum, bæði munnliga og skrivliga

YNSKILIGIR FØRLEIKAR
- Granskaraútbúgving (Ph.D.) ella tilsvarandi royndir við gransking og menning
- Altjóða royndir frá t.d. norðurlendskum ella EU granskingarverkætlanum
- Royndir frá undirvísing og vegleiðing av M.Sc./Ph.D.-lesandi
- Vinnulívsroyndir

VIT BJÓÐA
- Góðar menningarmøguleikar ígjøgnum granskingarsamstarv innan- og uttanlands
- Góðar møguleikar fyri at luttaka á altjóða ráðstevnum, skeiðum og fundum
- Møguleika fyri at arbeiða lutvíst heimanífrá
- Kappingarføra løn, sum verður avtalað í mun til útbúgving og royndir

Meira fæst at vita við at venda sær til Hannes Gislason, granskingarleiðari, M.Sc. Ph.D., fartlf.: 214749, teldupost: hannes@fiskaaling.fo ella Ingolf Joensen, stjóri, M.Sc., fartlf.: 214747, teldupost: ingolf@fiskaaling.fo.

UMSÓKN
Umsókn við ævisøgu (C.V.) og avriti av viðkomandi skjølum kann sendast til:

P/F Fiskaaling
Við Áir
Att.: Hannes Gislason
FO-430 Hvalvík

Umsóknarfreistin er 10. apríl, 2006.

TEAM85 © Photographer: mehmet alci | Agency: Dreamstime.com




# Lærlingur

***Til handil okkara 2x3 í Tórshavn, sóknast vit eftir einum dugnaligum lærlingi.***

**Starvið**
inniber, at tú sum frálíður fært ábyrgd av ávísum økjum og skalt fyrst og fremst virka innan sølu og tænastu mótvegis kundum okkara.
Samstundis verður innkeyp og samskifti við veitarar av vørum til handilin sum frálíður ein náttúrligur partur av arbeiðisdegnum.

**Lærutíðin**
er 3 ár um umsøkjarin hevur lokið FHS-útbúgving og 2 ár um HH-útbúgving er lokin.

**Vit vænta**
at tú ert málsøkin, setur kundatænastu í fremstu røð og hevur evni og viljan at verða ein virkin luttakari ímillum nakrar sera dugnaligar starvsfelagar.

**Tú fært**
eitt spennandi lærupláss har tú kanst menna tíni evni innan handil og sølu á einum stórum og sera virknum arbeiðisplássi.
Løn- og setanartreytir verða sambært avtalu.

**Umsóknarfreistin**
er mánadagin 27. mars 2006, og skulu umsóknirnar sendast:

**Timburhandilin**
Heykavegur 4
Box 3038
100 Tórshavn
Att.: Jørmann Petersen

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN




www.alma.fo Tlf 31 58 90 Fax 31 04 68



Visti tú ikki tað? Sosialurin

www. Sosialurin .fo